## formuladeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 23 | 12 - 9 - 2 | 49 | 24 | 25 | 45 |
| 2 B36 | 23 | 12 - 8 - 3 | 32 | 14 | 18 | 44 |
| 3 HB | 23 | 13 - 4 - 6 | 60 | 30 | 30 | 43 |
| 4 NSÍ | 23 | 11 - 7 - 5 | 42 | 33 | 9 | 40 |
| 5 EB/Streymur | 22 | 9 - 9 - 4 | 38 | 30 | 8 | 36 |
| 6 KÍ | 23 | 7 - 3 - 13 | 34 | 42 | -8 | 24 |
| 7 GÍ | 23 | 6 - 4 - 13 | 30 | 46 | -16 | 22 |
| 8 ÍF | 23 | 5 - 7 - 11 | 28 | 52 | -24 | 22 |
| 9 VB | 23 | 5 - 5 - 13 | 30 | 51 | -21 | 20 |
| 10 TB | 22 | 3 - 6 - 13 | 22 | 43 | -21 | 15 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 14 | 12 - 1 - 1 | 54 | 11 | 43 | 37 |
| 2 B71 | 13 | 11 - 1 - 1 | 56 | 7 | 49 | 34 |
| 3 FSV04 | 14 | 10 - 1 - 3 | 44 | 13 | 31 | 31 |
| 4 AB | 14 | 8 - 2 - 4 | 32 | 28 | 4 | 26 |
| 5 HB | 13 | 6 - 1 - 6 | 33 | 30 | 3 | 19 |
| 6 LÍF | 14 | 4 - 3 - 7 | 38 | 38 | 0 | 15 |
| 7 Sumba | 14 | 4 - 1 - 9 | 27 | 58 | -31 | 13 |
| 8 B36 | 14 | 3 - 3 - 8 | 15 | 34 | -19 | 12 |
| 9 Royn | 14 | 3 - 2 - 9 | 15 | 48 | -33 | 11 |
| 10 GÍ | 14 | 0 - 1 - 13 | 14 | 61 | -47 | 1 |

## Máltindarnir

adidas

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 13 |
| Bogi Gregersen | Skála | 12 |
| Sorin Anghel | EB/S | 11 |
| Hans á Lag | HB | 10 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 10 |
| Allan Mørkøre | B36 | 9 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 9 |
| Dan Djurhuus | VB | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Sámal Joensen | GÍ | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 6 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Andy Olsen | NSÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Páll M. Joensen | NSÍ | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 23 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 15 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 13 |
| Sonny Johannesen | FSV04 | 12 |
| Magnus Olsen | B71 | 10 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 10 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 8 |
| Ovi Magnussen | B68 | 7 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 7 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 7 |
| Kim Poulsen | FSV04 | 6 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 5 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 5 |
| Eli Hentze | B71 | 5 |
| Fróði Joensen | LÍF | 5 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 5 |

# Gøtumenn eru niðri

**GÍ tapti botndystin í Gundadali, og á Sandi staðfesti Clayton Soares enn einaferð, at hann er í serflokki vandamesti áleyparin í deildini**

2. DEILD

*Jákup Mørk*

Enn er matematiska vissan ikki heilt vís. Men tað munnu tó vera sera fá, sum ivast í, at næst besta liðið hjá GÍ longu hevur bílagt sær atgongumerki til triðju deild.

Í teimum trettan undanfarnu dystunum hevði liðið bert vunnið sær tað eina stigið, sumteir fingu í heimadystinum móti B36, sum alt árið hevur havt sætið á næst niðasta plássinum.

B36 hevur tó skavað sær nøkur stig saman gjøgnum árið, og tí var talan um sannan lykladyst, tá gí vitjaði í Gundadali í seinasta leikumfari. Tað var ein dystur, sum at kalla kundi staðfesta lagnuna hjá GÍ, og tað gjørdi hann eisini.

Við einum máli hvørju megin steðgin syrgdu heimamenninir fyri, at tað so ikki verða teir, sum fara beinleiðis niður. Og saman við hinum úrslitunum syrgdu tey trý stigini eisini fyri, at B36 fyri fyrstu ferð í ár er røttu megin strikuna, sum skilur áttan og níggjunda plássið.

### Tvey-settari á Sandi

Tað er framvegis B68, sum er oddaliðið í deildini, men B71 hevur tó enn ein dyst til góðar, og leygardagin staðfestu teir og Clayton Soares, at liðið er eitt sera gott boð upp á møguliga uppflyting.

Skal tosast í tennis-máli, so gjørdist talan um ein tvey-settara, sum B71 uttan stórvegis dikkedarir vann 6-0, 6-0. Ikki minst Clayton Soares gjørdi um seg, og við seks málum hesaferð, hevur brasilski áleyparin nú skotið imponerandi 23 mál í 13 dystum.

Týsdagin spælir B71 so útsetta dystin móti HB, og verður talan tá aftur um trý stig, er B71 aftur á odda í deildini.

Men tað verður so í harðari kapping við B68. Toftamenn høvdu hesa ferð vitjan av AB, sum gav teimum ein lítlan skelk, tá Sólbjørn Olsen legði gestirnar framum. Tað var tó skjótt, at B68 setti tingini upp á pláss. Fyri steðgin togaðu teir seg upp á 2-1, og í seinna hálvleiki var bara ein vegur.

Tað var tað eisini í Sandavági, har FS Vágar 2004 hevði vitjan av HB. HB hevur í ár staðið seg rættiliga væl, men nýggja linjan í Formula-deildini, har Julian hevur nýtt fleiri av yngru kreftunum, hava av álvara trekt tenn úr liðnum.

Vágamenn høvdu heldur ikki stórvegis trupulleikar at vinna ein tryggan sigur, og tó at tað neyvan verður talan um uppflyting, so eru eisini teir enn væl við í stríðnum um heiðursmerki í deildini.

Seinasti dysturin var í Hvalba, har Royn við 1-1 javnleikinum datt eitt pláss niður á talvuni. Ein veruleiki, sum ger tað enn meira neyðugt at vinna, tá liðið um eina viku vitjar í Gøtu.

### Úrslitini

B36-GÍ 2-1 (1-0)
B71-Sumba 12-0 (6-0)
B68-AB 5-1 (2-1)
FSV04-HB 5-1 (1-1)
Royn-LÍF 1-1 (0-1)

# B36-dreingirnir meistarar

Enn er eitt umfar eftir at spæla, men teir verða ikki tiknir kortini. Sum er, er B36 trý stig undan NSÍ á øðrum plássi, og við einum betri innan hýsis roknskapi eru havnardreingirnir tí vísir í, at FM-gullið kann leggjast afturat steypinum, sum teir vunnu fyrr í ár.

Johan Ellingsgaard skeyt einsamalla málið í Klaksvík, har gullið altso varð endaliga staðfest við einum 1-0 sigri leygardagin.

**-mørk**

# B36 vann eisini smápiltarnar

Í kapping við TB, VB og HB vunnu smápiltarnir hjá B36 sína kapping, tá finaluumfarið varð spælt í Havn leygardagin.

Talan var um eina sera spennandi kapping, har TB legði seg á odda, eftir at B36 tapti sín fyrsta dyst móti HB.

B36 vann tó dystin móti TB, og so máttu teir í ársatalsfelagnum vóna, at HB eisini kundi arga tvøramenninar, meðan B36 skuldi vinna sín dyst móti VB.

Tað var júst eisini tað, sum hendi, og tá teir báðir seinastu dystirnir vórðu blástir av, mundi fagnaðurin í B36 leguni ongan enda tikið.

**-mørk**

# NSÍ er í finaluni

NSÍ skal spæla unglingafinaluna móti HB. Tað varð greitt í kvøld, tá ið NSÍ í góðveðrinum í Runavík vann í hálvfinaluni móti KÍ.

Tá ið vanliga leiktíðin var farin, stóð tað á jøvnum 1-1. KÍ legði seg á odda tíðliga í 2. hálvleiki, og lítla løtu seinni javnaði NSÍ.

Einki mál kom afturat í vanligu leiktíðini. So varð spælt tvær ferðir tíggju minuttir. Heldur ikki tá kom nakað mál. Tað skýmdi rættuliga, tá ið farið varð undir brotssparkskappingina. Hana vann NSÍ 6-5. Eftir at báðir partar høvdu skotið fimm spørk, var støðan 4-4. Báðir partar skoraðu, tá ið teir royndu fyri sættu ferð. So misnýtti KÍ sjeynda sparkið, og tá ið NSÍ síðani skoraði, tryggjaðu teir sær pláss í finaluni.

HB vann mikukvøldið hina hálvfinaluna móti B36. Komandi mikukvøld skulu HB og NSÍ spæla finalu á uttanveltaðum vølli, og sama kvøld skulu B36 og KÍ spæla um bronsumerkini.

**-jh**

# Nick Heidfeld verður BMW koyrari í 2006

Dámligi týski Williams BMW koyrarin Nick Heidfeld skiftir sambært f1.com til nýggja BMW liðið í næsta kappingarár. BMW og Williams gevast við samstarvinum aftan á hetta kappingarárið, tí BMW hevur keypt Sauber liðið, ið samstundis skiftir navn til BMW racing.

Nick Heidfeld hevur áður koyrt fyri Sauber, og hevur í ár brúkt BMW motorin í sínum Williams bili, sostatt kennir hann væl bæði liðini. Hann sigur við f1.com, at hann gleðir seg almikið til samstarvið, ið fyribils fevnir um ein trý ára sáttmála.

Heidfeld hevur møguliga koyrt sína seinastu koyring fyri Williams. Tvær tær seinastu formel 1 koyringarnar hevur hann sitið uttanfyri við høvuðpínu, aftan á eitt óhapp í eini formel 1 venjing. Hann er nú komin fyri seg aftan á hendan skaða, men var áhalsin á súkklu í vikuni og brákaði økslina. Hann verður tí enn einaferð avloystur av brasiliumanninum Antonio Pizzonia, tá formel 1 koyringin verður í Brasilia í komandi vikuskifti.

**-nud**

---

# U 19 landsliðið er nú úttikið

Frá 5. og til 9. oktober skal føroyska U 19 fótbóltslandsliðið luttaka í EM undankapping í Svøríki. Nú er tað greitt, hvørjir teir átjan spælararnir eru, sum fyrst í oktober skulu umboða Føroyar í Svøríki.

Einir átta spælarar hava hetta kappingarárið spælt í Formuladeildini. Summir eru fastir menn í bestu deildini, og aðrir hava verið løtir á vøllinum. Tveir spælarar royna í eingilsku Everton og Manchester City at stríða seg gjøgnum nálareygað fyri at sleppa framat á høgum støði í útlandinum, og ein roynir seg á unglingaliðnum hjá OB í Odense.

Teir, sum hava fingið landsliðsboð, eru Trúgvi Askham og Ólavur í Ólavstovu, FS Vágar, Einar Hansen og Bogi Løkin, NSÍ, Andreas Lava Olsen, LÍF, Jóhan V. Gunnarsson og Levi Hanssen, B36, Kristoffur Jacobsen, KÍ, Poul T. Dam, HB, Gunnar H. Haraldsen, Fram, Jón Krosslág Poulsen, VB, Sam Jacobsen, GÍ, Símun Rógvi Hansen, B71, Frank Poulsen, ÍF, Per Heinasson, SÍ, Jóhan Trost Davidsen, Everton, Pætur T. Jørgensen, OB og Christian R. Mouritsen Manchester City.

Føroyar skulu 5. oktober spæla móti Belgia, 7. oktober móti Ungarn og 9. oktober móti Svøríki. Venjarar hjá U 19 landsliðnum eru Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham.

**-jh**